

Bretskur skattalætti ger at fleiri fara at vilja tosa við Ben Arabo, stjora í Atlantic Petroleum. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Skattalætti økir áhugan fyri Atlantic Petroleum

**Jógvan Hugo Gardar**

18.03.2015 - 16:40

Oljan.fo

Í dag kemur bretski skattamálaráðharrin, Duncan Alexander, við einum uppskotið um fíggjarlóg fyri Bretland. Í hesum uppskotinum verður rokna við at ein partur er at oljufeløgini sum eru á bretska landgrunninum fara at fáa ein skattaløtta. Sum er gjalda oljufeløgini ein fyritøkuskatt sum liggur um 30 prosent, og ein eyka oljuskatt uppá eini 30 prosent. Tað er oljuskatturin sum nú kann verða lækkaður, og helst er talan um eina løkking niður í 20 prosent.

Lækkingin kemur sum ein avleiðing av at oljuprísurin er nógv lækkaður, samstundis sum bretska stjórnin vil hava oljufeløgini at gera nýggjar íløgur fyri at finna meir olju, nú fleiri av stóru oljuøkjunum eru við at tømast.

Føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum hevur nógv virksemi í bretskum sjógvi, og er eitt av feløgunum sum á fleiri hættir kann fáa fyrimunir av eini skattalækking.

Eg veit ikki enn í nágreiniligum tølum - vit síggja detaljeraða uppskotið tá tað kemur, men tað er greitt at aktivini hjá okkum gerast meiri verd. Bæði tey, sum eru í framleiðslu, og tey, sum skulu útbyggjast, sigur Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum við oljan.fo.

Atlantic Petroleum eigur fleiri loyvir sum ikki er bora í enn, umframt loyvir har framleiðsla er byrjað. Hetta ger at tey stóru oljufeløgini fylgja væl við í virkseminum hjá Atlantic Petroleum, serliga tí hetta felagið hevur havt meir eydnu í fleiri av sínum loyvum, enn kappingarneytar sum eru um somu støðd.

- Tað kann eisini væntast at áhugin fyri okkara leitiloyvum á bretska landgrunninum gerast meiri áhugaverd, eftirsum ein skattlækking ger, at minsta mongdin av olju ella gass, sum man skal finna gerast lægri, sigur Ben Arabo.

Atlantic Petroleum tryggjar sær vanliga partar av leitiloyvum tíðliga, og nærri ein kemur boring og framleiðslu, so verða partar av loyvunum seld til størri íleggjarar, ið fíggjarliga orka betri at lyfta stórar oljuframleiðslur.